## Rókur og Heini vunnu

Liðið hjá Heina Hanusarson og Róki Akralíð, Elite 3000 Helsingør, spældi í gjár dyst í næstbestu donsku deildini ímóti Team Sydhavsøerne. Av eini ella aðrari orsøk var Heini Hanusarson ikki við, meðan Rókur Akralíð fekk nakað av tíð á vøllinum henda dagin uttan at skjóta nakað mál. Liðið hjá Heina og Róki vann dystin 30-27, og við sigrinum eru teir komnir upp á 6. plássið í deildini við fimm stigum eftir fimm dystir.



## Gera skjótt av

Franska landsliðið steðgar stutt í Føroyum. FSF hevur fingið at vita, at franska ferðalagið fer at lenda í Vágum fríggjadagin klokkan tólv. Fransmenninir koma henda vegin við leiguflogfarið. Tá ið dysturin verður liðugur um nátturðatíð leygarkvøldið, og stóru stjørnurnar verða lidnar undir brúsuni og at tosa við mongu tíðindafólkini, fara teir í bussi beinleiðis vestur á flogvøllin og til hús aftur. Franska landsliðið fer at búgva á Hotel Føroyum, meðan teir eru í Føroyum. Har fara teir ivaleyst at kenna seg aftur, tí teir búðu eisini har, tá ið teir síðst spældu her.

# Eingin samanlegging í S

**Í gjárkvøldið 10. oktober var nógv fundarvirksemi í Suðuroy. Limirnir í fótbóltsfeløgunum skuldu taka støðu til samstarvsuppskot, og eykaaðalfundur var lýstur í øllum feløgum. Í Hvalba og í Vági varð uppskotið samtykt, meðan tvøráfólk ikki ynskja samstarv**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Á fundunum í gjárkvøldið vóru greiðar ábendingar at síggja fyri hvat tað er, ið suðringarynskja viðvíkjandi samanlegging. Í Hvalba var einmælt samtykt við 36 atkvøðum fyri (100%), og í Vági vóru 37 atkvøður fyri (92,5%) og 3 ímóti.

Á Tvøroyri var støðan ein heilt onnur. Har skuldi tað vísa seg at vera heldur truplari at finna semju um hetta uppskot.

### Stór undirtøka

Heili 128 limir høvdu leitað sær út í TB-húsið hetta óveðurskvøld í oktober, og við einum rungandi sannførandi úrsliti søgdu limir felagsins nei til samstarv. Heili 66,4% ynskja ikki samstarv, meðan hini 33,6% ynskja tað. Samanumtikið var luttøkan á fundinum á Tvøroyri væl hægri enn á hinum plássunum, hetta helst tí at fólk ikki vóru á einum máli um, hvat gerast skuldi. Hvussu er og ikki, so fall samstarvsuppskotið á Tvøroyri.

### Uppskotsgrundarlagið

Støðan við fótbóltinum í Suðuroy hevur ikki verið av teimum bestu í skjótt nógv ár. TB hevur verið eitt lið, ið hevur ferðast nógv millum deildirnar. Meðan VB/Sumba hevur megnað at hildið sær uppi við bit og slit nakrar ferðir. Í Hvalba hava teir havt trupult at manna lið í næstbestu deildini, og førdi hetta eisini til, at liðið eitt skifti mátti niður í triðbestudeildina.

Støðan hesum viðvíkjandi hevur byrt undir hugsanunum um møguliga at leggja bestu liðini hjá feløgunum í oynni saman í eitt oyggjalið. Samstundis hava tey avbera góðu úrslitini í ungdómsdeildini seinastu árini eisini verið ein stórur partur av tí.

### Tvøránmenn vilja ikki samstarv

Á eykaaðalfundi í TB-húsinum í gjárkvøldið, har málið um samanlegging var á skránni, vóru nógv fólk møtt upp, og fólk tóktust spent um væntandi atkvøðugreiðsluna.

Eittans mál var á Skránni á Tvøroyri hetta kvøldið, og tað var spurningurin um limir felagsins vildu hava samstarv við hini liðini í oynni.

Úrslitið má sigast at tala fyri seg, tí tá helmingurin av atkvøðunum vóru taldar vóru tað greiðar ábendingar fyri, hvat úrslit fór at spyrjast burturúr. Hetta tóktist ikki at broytast, tí tá liðugt var samtalt, sást at av teimum 128 limunum, ið møttir vóru, høvdu 84 atkvøtt nei og bert 43 ja.

Hetta merkir, at Tvøráfólk við dundrandi meiriluta siga nei til samanlegging.

### Lógin

Lóg felagsins sigur annars, at um eitt mál skal koma ígjøgnum, skal fundurin vera viðtøkuførur, t.e. at tað skulu í minsta lagi 18 limir vera møttir, og meirilutin skal vera um 66% av taldu atkvøðunum.

- Úrslitið talar fyri seg og tað má man góðtaka, og fari eg í næstum at kalla nevndina til fundar. So má man arbeiða víðari herfrá, sigur Formaðurin í TB, Jóan Petur Olgarsson.



### Bygnaðarbroytingar í væntu

Ein nevndarlimur í TB, sum helst ikki vil vera nevndur, úttalar seg um broytingar í bygnaðinum í TB, ið eru í væntu. Hann leggur afturat at úrslitini í gjárkvøld ikki gjørdu hann so bilsnan.

- Hetta kundi man vænta, sigur hann.

Tó vil hann viðurkenna, at hann gjørdist eitt sindur bilsin av at síggja so greiðan meiriluta ímóti samstarvsuppskotinum á Tvøroyri.

Hann sigur víðari, at nú skulu ermar brettast upp og farast má til verka alt fyri eitt fyri at finna rætta leistin at arbeiða eftir

Áðrenn atkvøðugreiðsluna á Tvøroyri í gjár var greitt, at líkamikið hvat úrslit fór at spyrjast burturúr, fóru broytingar at vera framdar í bygnaðinum í felagnum.

- Felagið hevur tørv á at seta seg niður og umstrukturera seg, sigur sami nevndarlimur.

Ikki er heilt óhugsandi at ein líknandi leistur, og Jógvan Páll Lassen hevði á lofti á fundi í Øravík herfyri, verður nýttur.

Um so verður, at júst umtalaði leistur verður nýttur, umfatar tað, at felagið velur eina stjórn yvir sær. Hendan kemur at verða samansett av einum formanni, einum fíggjarstjóra og einum ítróttarstjóra.



*Stór mannfjøld er møtt til eykaaðalfund á Tvøroyri í gjárkvøldið, tey bíðaðu spent eftir úrslitinum av atkvøðugreiðsluni*